VALGREINAR

Grøni grundvøllurin

Kenneth Rasmussen
valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy

Náttúran er grøni grundvøllurin undir tilveru okkara. Náttúran er óbøtandi og skal umsitast á skynsaman hátt, tí er tað altið ein spurningur um at finna eina javnvág.

Vit hava eina livandi jørð, og livikorini á jørðini er grundarlagið fyri livikorum okkara. Dálka vit jørðina, dálka vit okkum sjálvi. Vit skulu verja umhvørvið við at hava greiðar reglur fyri brúki av náttúrutilfeingi. Hetta tryggjar búskaparvøkstur eftir náttúrunnar treytum.

At SEV í 2004 fer undir aftur stórar útbygg-ingar og ger árinskanningar aftaná er heilt burturvið.

Tað skal vera lógarkrav, at tá ið størri verkætlanir verða framdar, so skulu haldgóðar og óheftar árinsmetingar gerast, áðrenn farið verður til verka.

Sjálvstýrisflokkurin virkar fyri einum umhvørvispolitikki, sum tryggjar, at menningin av okkara samfelag ikki skaðar umhvørvið. Vit vilja varðveita náttúrunnar fjølbroytni og tryggja góð livikor fyri komandi ættarlið.

Tí arbeiðir Sjálvstýrisflokkurin fyri:

- at raðfesta umhvørvisvernd hægri
- at ein alsamt størri partur av orkuni í komandi tíðum kemur frá varandi orkukeldum
- at Kyoto-sáttmálin verður settur í gildi í Føroyum
- at grøn avgjøld skulu ásetast uttan at gerast ein eyka skattur
- at góðar sømdir verða veittar umhvørvisvinarligari framleiðslu
- og at umhvørvisdálking verður harðari revsað.

..men fyrst tørvar okkum tín stuðul 20. januar.

Útjaðarin

Svenning Borg
valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

Kapping millum virkir er ein treyt fyri at gagnnýta tilfeingi best møguligt ,men her hevur fráfarandi fullveldissamgonga hekta Suðuroynna av, so tað forslær.

Við verandi prísi hjá Smirli á farmi,sum er bæði til og frá Suðuroynni, dýrkar framleiðsluprísurin so nógv,at illa ber til at kappast við onnur virkir aðrastaðni í landinum,avleiðingin av hesum er so tann,at lítið og onki virksemi verður í oynni,og so harav lítið arbeiði Her haldi eg,at skal man tosa um økismenning.so má tað fyrsta vera tað,at vinnan fer møguleika at virka á sama støði í øllum landinum,og átti tí onki at goldið við skipunum hjá Strandferðsluni fyri flutning av rávøru og framleiðslu.

Sambandsflokkurin hevði uppskot á tingi um at javnstilla allar rutur hjá Strandferðsluni,so uttan mun hvar tú búði og hvar tú virkaði í landinum,so var gjaldið tað sama fyri at náa miðstaðarøki, hetta feldi samgongan,tí landskassin toldi ikki hettar.

Hesin sami landskassi sum hevur runni yvir í pengum nú í skjótt seks ár, kláraði ikki at bjóða ferðafólki og vinnuni sama møguleika uttan mun til bústað, nú mangla so 300milliónir í,so væl hevur runnið yvir. Tað er týðuligt, at onki hevur verið gjørt frá polistiskari síðu fyri at hjálpa vinnuni í Suðuroynni,so at hon kann kappast á jøvnum føti við aðrar í landinum, soleiðis, at nógv fleiri arbeiðspláss kundi veri í oynni..

Tí er tað greitt,at skal vinnan í oynni trívast,so velja okur Sambandsflokkin.

Alment og privat (1)

Jóhan Petur Johannesen
Valevni hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymi

Hvør er uppgávan hjá einum landi at umsita og hvør er uppgávan hjá privatum at umsita?

Hetta er ein spurningur ið kemur fram javnan í politikki, og ikki minst tá val stendur fyri durum, men tað tykir mær at vit í Føroyum hava ringt vit at taka støðu til, hvat ið skal verða privat og hvat skal vera alment. Men tað er ongin loyna at tá tú stillar upp fyri Sambandsflokkin, at so er tað púra natúrligt at nøkur av teimum almenn partafelógunum skulu at privatar hendur, lat men geva nøkur dømi.

Føroya Banki, tað er ikki ein almenn uppgáva at reka banka

Atlantic Airways, tað er ikki ein almenn uppgáva at reka flogfelag
Føroya Tele, tað er ikki ein almenn uppgáva at selja telefonsamtalur, Fax, internet, Televarp, men skal Føroya Tele deilast í tvey so at kervi kemur undir eitt alment partafelag, so tey sum kappast ikki hava fyri neyðini eitt nú at byggja hvør sítt net, sum t.d. sum vit hava við fartelefonnetinum

Hvat við stuðli til vinnuna?
Í prinsippunum skal eingin stuðul veitast, men er vinna illa fyri í eitt, ella tvey ár og útlit eru fyri at venda kemur í, kann stuðul veitast, men tað skulu treytir fylgja við.

1. onki vinnigsbýti verður goldið fyri enn landi hevur fingið sítt aftur.
2. Tað almenn skal hava innlit í allan roknskap, tí at felagi er undir umsiting.
3. Eitt umboð fyri ta almenna skal sita í nevndini

Hetta skal alt gerast fyri at vit kunnu tryggja okkum at vit ein góða og sunna vinnu.

Stuðul til vinnuna er vandamikil, um vit halda lív í vinnum, ið ikki kunnu yvirliva, tí skulu tær fáa ein virðiligan deyða.

Nýggjar vinnur ?
Tá vit so siga farvæl til eina vinnu so er møguleiki hjá okkum at siga góða dag til nýggjar, men tað tykist trupult hjá nýggjum vinnum at fóta sær, hví so er, er ringt at siga, men tað er uttan iva tí at vit hava eina alt og stóra blanding ímillum alment og privat.

Mannarættindi - fyri øll!

Gunnar K Nattestad
valevni Sambandsfloksins í Vágum

Okkara rættarskipan skal eitast at tryggja at tann óseki ikki verður dømdur sekur. Men tá talan er um tey ófoddu børnini, kunna vit í praksis taka lívið av øllum inntil tey eru 12 vikur gomul. Vit ógvast tá vit hoyra um, at fólk vera dømd til deyða fyri onkra brotsgerð, men hvat hugsa vit um at 10'tals av okkara egnu borgarum, verða avlívað á hvørjum árið uttan at hava gjørt nøkrum nakað?

Vit hava ikki deyðarevsing í Føroyum sigst, men hvat mundu tey ófoddu sagt um tey kundu svara? Barnið við mongolismu, barnið er úrslit av eini neyðtøku ella barnið ið hevur foreldur ið verða metta at vera socialt ella sálarliga illa fyri. Verandi lóg leggur upp til at hesi skula tínast um tey eru ófødd, men hjálpast sum best um tey eru fødd. Fyrstaflokks dupultmoralur!!!!

Tað ófødda barnið má vera tað ósekasta vit kunna ímynda okkum. Allíkavæl betalir tað mangan við lívinum fyri foreldrana misstøk. Hvussu ber tað til at mannarættindini ikki røkka her? Hvat sigur m.a. Amnesty International til hettar? Hvussu kunna somu fólk,ið berjast fyri, at bjarga m.a. drápsmonnum frá deyðarevsing, samstundis heilhjartað tala fyri fríum fosturdrápi og enntá viðmæla hettar sum lið í bardaganum móti fólkavøkstri og frígering av kvinnum?

Ófødda barnið kann einki siga, kann ikki tala sína søk, argumentera og mótmæla. Men er tað ikki júst her at MANNARÆTTINDINI koma inn í myndina, er tað ikki júst har tey veikastu hava sína verju? Vanliga kallað vit tey ið tala søk teirra veiku fyri stríðsmenn, men tey ið berjast fyri rættindi teirra ófoddu, vera kallað fanatikarar, kvinnu-niðurgerðarar og tað ið verri er.

Í Europa og partvís í Føroyum, óttast mong fyri tí fallandi barnatalinum og vaksandi talinum av eldri. Um vit hugsa okkum at øll ið eru dripin í móðurlívi vóru livandi borgarar í samfelagnum í dag, var hesin trupuleiki helst ikki til staðar. "Sum tú sáar, skal tú heysta" er gamalt og kanska er tað júst tað vit uppliva í dag!

Lívið er ein menning frá gitnaði til deyða - men tað er líka nógv lív alla tíðina! Sjálvt um eingin sær nakað og rópini ikki hoyrast- so er lívið ið verður tikið hitt sama og deyðin er líka veruligur.

Mín vón er at vit vilja geva okkara ófoddu somu rættindi sum okkum fødda. Lat okkum úr øllum flokkum standa saman um at verja tey veikastu í okkara samfelagi.

Mentanin skal røkjast

Jógvan Arge
Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi

Nú kom ein onnur síða av Miðflokkinum undan kavi.

Hann tekur ikki undir við teimum sømdum, sum eru ætlaðar mentanarlívinum í Føroyum, og vil skerja játtanirnar.

Tjóðveldisflokkurin tekur ikki undir við, at Tjóðpallur Føroya verður strikaður. Vit taka heldur ikki undir við at skerja møguleikarnar hjá øðrum listafólkum og neyðugum stovnum.

Tvørturímóti stremba vit eftir at skapa teimum betri umstøður fyri menning og virksemi.

Tjóðveldisflokkurin stendur fyri einum virknum mentanarpolitikki, tí mentanin er sjálvt grundarlagið undir tjóðini og lívinum hjá hvørjum einstøkum.

Mentan er at skapa, endurnýggja og vígdera fekags viði í samskifti millum menniskju.

Føroyskt mál og føroyska mentan hava ment seg við miðvísum stríði og fótað sær mótvegis øllum forsagnum í nútímans samfelagnum.

Nú standa vit mitt í nýggjum avbjóðingum, har vitanar- og kunningarsamfelagið er veruleiki og føroyingar skula virka sjálvstøðugt í altjóða samstarvi.

Tjóðveldisflokkurin rekur ein miðvísan mentanarpolitikk, sum leggur dent á:

at vit dubba okkum mentanarliga til tess at møta nýggju avbjóðingunum

at vit sum lítil tjóð nýta størri part av landsins figgjarlóg til mentamál

at bond ikki verða løgd á mentanararbeiðið og at samstarv er millum ta livandi mentanina og tað skipaða mentanararbeiðið.

Tað er eitt av okkara høvuðsmálum at røkja mentanina. Vit hava eisini farnu seks árini vísti í verki, at Tjóðveldisflokkurin meinar tað, hann sigur um framtøk á føroyska mentanarpallinum.

Tað skapandi mentanarlívið blómar, og tað skal tað framvegis fáa møguleikar fyri.

X við E

VALGREINAR

Psykiatriin ein skammarblettur!

Soffi Egholm
valevni Javnaðarfloksins í Norðstreymoy

Psykiatriin í Føroyum er ein skammarblettur fyri okkara samfelag.

Sálarsjúk í Føroyum eru goymd og gloymd og hava einki lívsviðir. Nógv er liðugviðgjørd og hava kortini verði noydd til at búgva á psykiatriskari deild í 30 ár, tí teimum vantar búðstað.

Sálarsjúk hava havt sera lágan politiskan prioritet í øllum fyrrverandi samgongum. Galdandi psykiatrilóg er frá 1938 og er út av lagi vánalig og ómenniskjanslig.

Javnaðarflokkurin tekur NÚ tey sálarsjúku og tey avvarðandi alvorligt, og vil gera eina nýggja og tíðarhóskandi psykiatrilóg.

Tann nýggja lógin skal betra um øll viðurskiftini hjá sjúklingunum og eisini skapa størri opinleika í viðgerini. Samstundis skal hon seta krøv til tey, sum standa fyri viðgerðini og til politiska mynduleikan um at tryggja sømulig og tíðarhóskandi kor.

Vit skulu kunna taka evnið psykiatri í okkara munn. Tað er uppá tíðina at hettar umráðið verður avmystifiserað soleiðis, at samfelagið á øllum økjum betri kann skilja støðuna hjá hesum sárbara bólki.

Fortreydirnar fyri at betra um umstøðunar hjá teimum sálarsjúku, og hjálpa teimum til at verða javnsett í samfelagnum, er at ein nýggj og tíðarhóskandi psykiatrilóg verður gjørd, skjótast til ber.

Hetta er eitt av mínum hjartamálum, sum nú eisini er við í vælskránni hjá Javnaðarflokkinum.

Mennan av kt-vinnu og alternativari vinnu er neyðugt í framtíðar Føroyum

Johan Dahl
løgtingsmaður og valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

Vit skulu øll gera okkum púra greitt at um vit ikki umskipa okkara skattaskipan fundamentalt og hava ein heilt annan hugburð til vinnu og vinnuskapan enn tann verandi, so koma vit ongantíð longur enn til at verða eitt rávøruframleiðandi fiskivinnutjóð.

Allir dreymar um BITLAND ætlanir, um KT-vinnu, um alternativar vinnur, - er einki annað enn tómt møsn so leingi vit hava verandi skattareglar og verðandi skattaskipan og ikki at gloyma hugburðin.

Sambandsfloksins mál er at taka leiðsluna av hesum landið aftan á 20 januar 2004 og málrættað byrja at gera broytingar sum koma at gagna øllum føringum.

Vit koma virka fyri at:

1. Vøkstur gjøgnum arbeiðsmegina: Virkini hava brúk fyri góðari arbeiðsmegi. Tí krevst ein vælvirkandi arbeiðsmarknaður og ein góð útbúgvingarskipan. Aftur at hesum koma góðar og tryggar rammur, sum eggja fólki at arbeiða.
2. Vøkstur gjøgnum ílogur: Føroyar skulu vera eitt vinnuvinarligt samfelag at gera ílogur og at reka vinnu í. Her krevst ein vælvirkandi kapitalmarknaður og góðar treytir til virkir, sum ynskja at spara upp og gera ílogur.
3. Vøkstur gjøgnum íongdsetara og kveikjara: Tað skal vera áhugavert og innbjóðandi at stovna og reka egna fyritøku.
4. Vøkstur gjøgnum gransking og menning: Neyðugt er at skapa góðar treytir fyri gransking og menning. Samstundis skulu vit gerast betur til at nýta granskingina og menningina til at skapa vøkstur.
5. Vøkstur gjøgnum frælsar marknaðir: Kapping eigur at vera á øllum marknaðum. Monopolmarknaðir skulu frigerast innanlanda, og vit skulu virka fyri at fáa betri treytir á útlendsku marknaðunum.

Skattaskipanin skal broytast, - tað skal nevniliga altíð loysað seg at arbeiða, tað skal verða ein gleði at fara til arbeiðis hvønn dag uttan at skatturin skal etað alt upp.

Saman við arbeiðsmarknaðinum og vinnuni vilja vit virka fyri skilagóðum loysnum, vinnuni, landið og fólkið at gagnið

Alternativar vinnur fáa einans gróðarlíkini, um tann føroyska skattalógin verður broytt, so at føroyingar og onnur virkandi á landi fáa sama møguleikan sum í grannanlondum (les kappingarneytum) okkara at arbeiða í altjóða høpi.

Virkir sum verða stovnað við alternativum vinnum, skal miðjast imóti at skula fáa eins góð skattlig viðurskifti í Føroyum sum grannalondunum vit komað at kappast við - t.d. Írland og Ongland.

Um tú hevur áhuga at arbeiða í altjóða høpi, so eru Føroyar eitt út av lagi vánaligt land at búseta teg í við verandi skattaskipan - hetta vilja vit broytað.

Vel SAMBANDSFLOKKIN tann 20 januar 2004 vit eru trygdin fyri vælferðarsamfelagnum.

Risastórt undirskot á fíggjarlógini

Kaj Leo Johannesen
valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Undirskotið á fíggjarlógini fyri 2004 verður um milliónir 100 og 200 milliónir krónur, áðrenn avdráttir uppá góðar 100 milliónir. Við øðrum orðum verða millum 300 og 400 milliónir krónir í gjaldførishalli. Hetta er tann sokallaða skynsama fíggjarstýringin frá undanfarnu samgongu.

Galoperandi útreiðsluvøksturin frá 1998 úr 2,3 milliardum krónum upp í 3,5 milliardir svarar til eina øking uppá góð 50%. Um hetta skal eitast at vera ein ábyrgdarfullur og strammur búskaparpolitikkur, hvat er so ein sparing uppá 400 milliónir krónur frá 1994 til 1998?

Tá vit tosa um mátar at fíggja samfelagið, so eru inntøkukeldurnar í dag blokkstuðulin og vinnulívið. Men tá blokkstuðulin er minkaður 366 milliónir krónur, skulu altso 366 milliónir fáast til vega, fyri at vit skulu fáa sama livistøði.

Hetta fæst ikki tilvega við herrópum og flosklum, men við atgerðum útfrá tí veruleika, vit liva í:

- Vøkstur gjøgnum arbeiðsmegina
- Vøkstur Vøkstur gjøgnum ílogur
- Vøkstur Vøkstur gjøgnum íongdsetarar og kveikjarar
- Vøkstur Vøkstur gjøgnum gransking og menning
- Vøkstur Vøkstur gjøgnum frælsar marknaðir

Frá 1998 til 2004 hevur inntøkan av blokkinum, sum hevur skapt vælferðina, verið 5.012 milliónir krónur, svarandi til samanlagt 20.048 ársverk fyri hesi árini ella 3.341 ársverk hvørt árið.

Samstundis eru lán til danska statin goldin niður við brævalánum frá 3.351 milliónum krónum niður á 1.651 milliónir, sum aftur førir við sær, at brævalánið uppá 300 milliónir krónur er hækkað upp á 1.500 milliónir krónur.

Her er eyðsæð, at ein heilt onnur og effektivari fíggjarstýring má til, um vit skulu fáa vent minus til pluss. Sambandsflokkurin hevur amboðini til hesa stýring, so tí er at geva flokkinum dyggan stuðul valdagin, so vit fáa brotið upp um armar og vent gongdini aftur rætta vegin.

Heimaútróður gevur arbeiðið til flestu hendurnar

Jóanis Nielsen
valevni Fólkafloksins í Vágum

Útróðrarmenn siga, at ymisk sløg av fiskireiðskapi á sama øki, er sera óheppið. Tað kann vera gott fiskarí við snellu á einum øki í langa tíð, ja, alla vártíðina, men kemur lína inn ímillum, er tað sum kvett á stokkinum. Sama siga línumenn um trolið. Teir kunnu fiska nógv á somu leið, men so títt og knapt trolið kemur í nánd, og eisini tá ið veitt varð við gørnum, minkar fiskiskapurin niður í lítið og einki. Eisini ger man hvørjum øðrum ónáðir við ymiskum reiðskapi á sama øki.

Økisfriðingarnar hava givið góð útslit.
Týdningarmikið er tí at halda fast við, at ávís øki á grunninum, í ávís tíðarskeið fyri ávísum fiskireiðskapi, eru friðað. Her átti útróðrarmaðurin sjálvur at verið við at lagt sovorið tilrættis og skuldi verið spurdur til ráðs. Grunnar okkara eru so smáir og viðbreknir, at tað er týdningarmikið at fara væl um teir. Partar av várgrunninum eiga framvegis, í eitt tíðarskeið, bert at vera loyvdir snellubátum, aðrir partar bara línubátum. Somuleiðis átti trolingin á landleiðini ikki at nerva tey økir har sildafiskur verður veiddur um summarið.

Snellu- og línuveiða.
Snellu- og línuveiða oyðileggja ikki botnin og taka tey eisini minstu nøgd av fiski upp av grunninum, hesi arbeiðsplass eru ikki so kapitalkrevjandi, hvørki í rakstur ella útvegan. Fleiri hundra menn og kvinnur og ungfólk eru, og kunna verða knýtt at einum snellu- og línufiskiflota: Manningum umborð á bátinum. -Egnarar í landi, sum kunnu vera menn, kvinnur og børn.-

Fólkið á virkjunum.-

Harafturat gevur hendan vinnan bestu góðskuna, tí fiskurin verður ofta avreiddur sama dag,ið hann er veiddur.

Bátar undir 30 fót úr fiskidagaskipanini
Nógv tjak hevur verið um, hvørs smábátar skulu verða í fiskidagaskipanini ella ikki, landsstýrismaðurin arbeiddi nú við at fáa smábátarnar úr hesi skipan, ætlanin var at nýggja skipanin skuldi setast í verk 1. mars, tá ið nýggj loyvir skuldu útskrivast til bólk 5. Hetta verður gjøgnumført um Fólkaflokkurin aftur fær ávirkan á fiskivinnupolitikkin.

Trolaraflotin - tingmenn høvdu ikki rygg …
Nøgdirnar trolaraflotin kemur við eru so stórar, at hesar høvdu vit ikki kunna verið fyriuttan. Tí skal arbeiðast fyri, at eisini hesin flotin fær bestu umstøður at virka undir. Fiskidagarnir eiga ikki at minkast meir. Seinasta minkingin, av samlaða fiskidaga-talinum, uppá 1% kom ígjøgnum, tí at tingmenn ikki høvdu rygg at standa ímóti dómadagsfráboðanini frá ICES, teir søgdu at teir vildu vísa "góðan vilja". Nei slíkt eru ikki fólk at standa á odda fyri landi okkara.

X við Fólkaflokkin

Borgan fyri framhaldandi menning í VÁGUM

Gott val